OFFSHORE EUROPE 1991 – oljuráðstevna í Aberdeen

Dropar, ið bjarga búskapi okkara – størsta avbjóðing í nýggjari tíð

– Seismiskar kanningar og royndarboringar á føroyska landgrunninum eiga at byrja í seinasta lagi komandi vár, heldur Jóhan Mortensen, ein stigtakari til føroyska luttøku á altjóða gass- og oljuráðstevnu í Aberdeen.

Oljuvinnan er størsta avbjóðing okkara í nýggjari tíð – sjálvandi um olja finst á grunninum okkara – og kemur avgjørt at bjarga búskapi okkara. Tað fyrsta føroyingar eiga at gera, er at fáa avtalur í lag við útlendsk feløg um kanningar, og tað kann gerast sjálvt um spurningurin enn ikki er greiddur millum danir og føroyingar um rættin til undirgrund og havbotn.

Føroyingar fara at taka lut á altjóða ráðstevnuni »Offshore Europe 1991« fyrstu viku í september.

Hetta tiltak er kanska serliga ætlað ídnaðarfólki, peningastovnum, útbúgvingarstovnum, fyrisitingum, politikarum, fjølmiðlum og øðrum, ið áhuga hava fyri møguligari framtíðar oljuvinnu í Føroyum, og øðrum, ið at hesum er tengt.

Stigtakarar til føroysku luttøkuna á hesi stevnu, sum hildin verður í Aberdeen, eru P/F Faroe Offshore International við Danny Poulsen, Søldarfirði, og Jóhan Mortensen, bretskum konsli í Føroyum. Innskrivað verða ferðandi hjá Faroe Travel.

Farið verður við leiguflogfari úr Vágum beinleiðis til Aberdeen sunnudagin 1. september, og heim aftur verður flogið leygardagin 7. september. Gist verður á vistarheimi lærda háskúlans í Aberdeen.

Sjálv framsýningin og ráðstevnan um olju- og gassídnað verður í The Aberdeen Exhibition and Conference Centre Bridge of Don. Við 1500 framsýnarum úr fleiri enn 20 londum er hetta hin 10. Offshore Europe ráðstevnan og framsýningin. Innandura fevnir tiltakið alt um 20.000 fermetrar. 130 fyrilestrar vera í 20 framløgum.

Tað er The Offshore Europe Partnership, Spearhead Exhibition og The Society of Petroleum Engineers, ið skipa fyri. Vertur er The United Kingdom Offshore Operators' Association.

Jóhan Mortensen, konsul, ein av stigtakarunum til føroysku luttøkuna á Offshore Europe 1991.

Verða slík risastór skip sum hetta í framtíðini dagliga sjón í Føroyum. – Oljutangaskipið »Stratus« úr Liberia, sum í nakrar dagar hevur ligið á Havnarvág.

Fundur, ið ikki fer aftur við borðinum

Luttøkan er avmarkað til at fevna um fólk, ið veruliga hava áhuga fyri olju- og gassídnaði.

Føroyingarnir í ferðalagnum hjá Faroe Offshore/Faroe Travel, verða innskrivaðir frammanundan; tað er at siga, at teir fáa útflyggjað frí atgongumerki, ókeypis skrá, luttøkuseðlar og neyva fráboðan um ferðing, innivist, útferðir og annað.

Offshore Europe snýr seg ikki einans um norðsjóvarøkið, men eisini um øki frá landi um alt Europa – um allan heim.

Danny Poulsen og Jóhan Mortensen, forsprákarar fyri føroysku luttøkuni, siga, at nú búskaparlig aftugongd og kreppur níva, er at minnast aftur á tvinni tiggjuáraskeið við menning við norðsjóvarolju og -gassi og líta inn í eina framtíð við góðum úrslitum og bjartskygni.

Bæði viðvíkjandi menning og íløgum sum aldri áður, og útlitum fyri mesta tørvi á arbeiðsmegi í olju- og gassdeplum Skotlands, eru bjartskygni og framtíðarvánir tey bestu. Serfrøðingar innan ýmsi øki innan olju- og gassvinnu úr fleiri enn 60 londum fara at taka lut á ráðstevnuni og framsýningini í Aberdeen. Mest týðandi umboðini eru tey, sum eru før fyri at seta pening í olju- og gasskanningar, heimsumfatandi framleiðarar, verkfrøðingafeløg, byggifeløg og -ráðgevarar, fyritøkur, ið veita tænastur, borifeløg og fyritøkur, ið framleiða útgerð.

Størsta oljutiltakið í Aberdeen nakrantíð hevur til endamáls at vísa nýggju, bjørtu støðuna á europeisku økjunum frá landi og avbjóðingarnar, ið oljufeløgini fara at taka við. Dentur verður lagdur á bíliga undirsjóvar tøknifrøði – bæði á framsýningini, í fyrilestrum og í orðaskifti.

»Offshore Europe« er einasta veruliga høvið at sýna fram so víttfevnandi og fjølbroytt tilfar av tøkni, nýggjari útgerð, nýskapandi tøknifrøði og skifti av hugskotum í Europa.

– Og hetta fer ikki aftur við borðinum í ýmsu stjórnardeildunum og stóru feløgunum, sum bæði verða hjástødd og taka lut til fulnar, siga stigtakararnir.

Langt inn í komandi øld

Bretski ídnaðurin frá landi er nú heilt komin fyri seg aftur eftir fallið á oljuprísunum í 1986, og Offshore Europe ráðstevnan og framsýningin í ár fara vissuliga at prógva vøksturin og menningina í øllum ídnaðinum.

1990 var metár í royndarboringum og funnum oljukeldum. 206 royndarboringar vórðu gjørdar, nógv fleiri enn metárið 1984. Eitt avbera gott úrslit ta havt verður í huga, at ílt verður farnaði arbeiðinum í byrjanini. 25 nýggjar keldur vórðu funnar.

Kanningar og royndarboringar frammanundan hava havt við sær miklar íløgur. Í dag er íløgan 4–5 mia. sterlingpund um árið, t. e. um 50 milliardir krónur.

Júst kunngjørdu úrslitini av 12. umfarinum viðvíkjandi loyvum, og av loyvum á markinum á leiðini millum Føroyar og Bretland vestan fyri Hetland, sýna, at kappingin enn er hørð og at oljufeløg eru fús til at veita øktar og framhaldandi íløgur og tíð til at leita eftir kolvatnsevni á hesum leiðum. Bretar hava 90 nýggjar konstruktiónir tætt at føroyska markinum.

At hesi umfør hava hepnast so væl, tryggjar, at UKCS (United Kingdom Continental Shelf, t. e. bretski landgrunnurin) verður verandi eitt meginøki viðvíkjandi olju- og gassframleiðslu langt inn í komandi øld.

Bjargingin?

Nú bretar eru so virknir tætt upp at okkara leiðum og hava funnið oljukeldur, er spurningurin hvat føroyingar ætla. Vit eru onga leið komnir enn. Alt hongur í leysari lutt bæði hvat spurninginum um rætt til undirgrund og royndarboringar viðvíkur.

Vit hava hitt ein av stigtakarunum til føroysku luttøkuna á Offshore Europe, Jóhan Mortensen, konsul, á máli, og hann sigur, at stórur áhugi er í Bretlandi fyri føroyska landgrunninum og tí, sum í honum er, og somuleiðis eru stevnuforsprákararnir í Aberdeen ógvuliga spentir at hitta føroyingar á máli um oljuvinnuna og framtíðarmøguleikar hennara.

– Vit kunnu ikki lata eygunum aftur fyri føroyskum offshorevirksemi [offshore – fram við strondini út frá landi], og vit eiga helst næsta vár at fara undir seismiskar kanningar og royndarboringar til tess at kenna geografiska møguleikan fyri olju á føroyska landgrunninum, sigur Jóhan.

Hann sigur, at føroysk feløg eiga at stovnast nú beinanvegin at gera neyðugu fyrireikingarnar eins og føroyingar eiga at skúlast á øllum økjum innan oljuvinnuna. Tílíkt virksemi sum hetta fer at skapa arbeiðspláss og annars fáa gongd á virksemi beinanveg. Norðsjógvurin er hin mest ekspanderandi, og menn eru bjartskygdir. Miðskeiðis í hesum øllum koma Føroyar at liggja á krossvegnum. Oyggjarnar hava tessvegna alstóran áhuga.

– Hetta verður okkara størsta avbjóðing í nýggjari tíð og avgjørt ein gongd leið at fáa búskaparligu naggatøðnina í samfelagi okkara burtur, sigur Jóhan Mortensen, men vísir samstundis á, at hetta í aðrar mátar verður kollveltandi og kemur at broyta mynstrið í samfelagnum heilt munandi.

Skulu útlendsk feløg gera íløgur í oljuvinnuna er neyðugt at broyta skattareglur o. tl.

Jóhan Mortensen sigur, at her má arbeiðast professionelt. Tí oljan – um nakrir dropar væl at merkja eru til á okkara landgrunnum – fer heilt avgjørt at bjarga búskapi okkara. Fyrsta stigið má vera avtala við útlendsk feløg um kanningar, og tað kann gerast sjálvt um spurningurin enn ikki er greiddur millum danir og føroyingar um rættin til undirgrund og havbotn. **pn**

STATENS PRÆMIEOBLIGATIONSLÅN 1977/02

3. afdeling

Orange obligationer med serienumre 8001-9000 og løbenumre 5001-6000 incl.

28. trækning august 1991

Følgende præmier er udtrukket

			serie nr	løbe nr	serie nr	løbe nr	serie nr	løbe nr	serie nr	løbe nr	serie nr	løbe nr	serie nr	løbe nr
1.000.000 kr.			8588	5443										
500.000 kr.			8007	5802										
250.000 kr.			8979	5930										
100.000 kr.			8253	5655	8766	5430	8770	5668						
50.000 kr.			8065	5457	8198	5870	8602	5421	8934	5497				
25.000 kr.			8060	5054	8631	5395	8675	5515	8758	5915	8911	5734		
			8442	5193	8636	5253	8691	5862	8906	5841	8972	5405		
10.000 kr.			8006	5428	8218	5113	8477	5628	8625	5713	8827	5973	8928	5391
			8020	5310	8233	5647	8580	5595	8726	5659	8850	5584	8970	5544
			8063	5494	8238	5146	8615	5545	8771	5181	8886	5220	8979	5950
			8192	5577	8448	5689								
5.000 kr.			8076	5656	8306	5532	8398	5501	8445	5194	8619	5430	8853	5750
			8143	5741	8316	5921	8405	5240	8477	5464	8634	5667	8887	5869
	8026	5679	8212	5285	8353	5742	8407	5835	8525	5592	8675	5120	8923	5143
	8026	5842	8273	5446	8374	5506	8427	5408	8526	5980	8698	5665	8925	5785
	8060	5136	8276	5773	8381	5897	8438	5243	8558	5400	8742	5124	8981	5418
	8073	5210	8306	5407	8387	5564	8438	5269	8562	5050	8774	5835	8990	5699
1.000 kr.			8154	5519	8324	5045	8417	5748	8638	5504	8820	5464	8886	5233
			8159	5851	8352	5306	8424	5486	8642	5881	8826	5866	8886	5629
			8170	5569	8356	5681	8458	5934	8646	5948	8829	5376	8887	5722
			8212	5553	8359	5675	8463	5566	8666	5436	8841	5499	8917	5057
			8219	5162	8363	5333	8482	5920	8675	5450	8843	5416	8920	5905
	8010	5337	8223	5887	8364	5507	8486	5107	8677	5454	8844	5145	8936	5091
	8021	5055	8230	5083	8367	5612	8527	5285	8682	5830	8854	5484	8938	5878
	8032	5540	8238	5401	8371	5835	8557	5115	8704	5519	8860	5770	8939	5678
	8047	5825	8248	5423	8372	5069	8565	5970	8734	5299	8869	5175	8943	5091
	8065	5623	8255	5573	8372	5578	8568	5673	8741	5972	8870	5591	8946	5996
	8077	5333	8277	5379	8377	5029	8578	5888	8754	5931	8872	5454	8951	5453
	8096	5341	8286	5071	8381	5086	8583	5640	8756	5784	8879	5016	8954	5643
	8101	5833	8297	5477	8388	5551	8626	5936	8787	5826	8882	5138	8970	5060
	8143	5592	8298	5618	8396	5987	8631	5348	8804	5521	8882	5409	8993	5825
	8148	5859	8302	5298	8405	5058	8636	5416	8805	5315	8884	5298	8994	5308
500 kr.	Alle obligationer med løbenummer 5429 eller løbenummer 5866 uanset serienr.													

Numrene på ikke indløste præmier fra de seneste fem trækninger vil, ligesom samtlige ovenstående numre, blive opført i den officielle trækningsliste, som kan købes for 3,00 kr. i bladudsalgene. Trækningslisten vil ligge til eftersyn på alle posthuse. **Præmieudbetalingen finder sted i Danmarks Nationalbank og udvalgte posthuse fra den 14. august d. å.** Trækningslister kan leveres på databærende medier ved henvendelse til DATA-SATS informatik A/S (telf. 42 52 21 00)

Kongeriget Danmarks Hypotekbank og Finansforvaltning
Landgreven 4, 1301 København K. Telefon 33 92 80 00

Griffilin
SMS - TLF. 10840